

Vit hava vælumtøktu vind- og vatntøtt flees-jakkarnir frá SCIERRA

*Frá 18-24 desember verður latið 15% í avslátri av øllum vetrarklæðum, stivlum og fiskireiðskapi.*

***Rætta jólagávan fæst sjálvandi frá***

**NORÐOYA GASSØLU**
KLAKSVÍKSVEGUR 68
FO-700 KLAKSVÍK
TEL. 45 79 37


## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin og vinnulívið

**Edva Jacobsen**



Sambandsflokkurin ynskir at skapa tær bestu fortreytirnar fyri vinnulívinum í landinum. Teir bestu karmarnir skulu setast upp, soleiðis at vinnan kann menna seg á allarbesta hátt.

Tað almenna skal ikki reka vinnulív, tí tað eru teir privatu bestir til, um teir fáa loyvi til tess. Landið skal ikki leggja meinbogar í vegin fyri vinnulívinum við avgjøldum og øðrum hindringum, men skal stuðla upp undir.

Allar royndir við einari samanblanding millum landskassa og vinnulív eru miseydnaðar og tí skulu vit forða fyri hesum.

Spurningurin er so, hvussu skal tað almenna stuðla vinnulívinum? Tað er ein almenn skylda at skipa fyri, at havnaløgini eru so atkomulig sum gjørligt, at vegakervið er heilt útbygt, so vinnan kann virka uttan ampa fyri hesum millum bygdir og oyggjar, soleiðis at flutningskostnaðurin verður so lítil sum møguligt.

Eisini er tað ein skylda, at tað almenna veitir eina so góða skúlaskipan sum gjørligt, fyri at vinnulívsfólkini og starvsfólk teirra hava eina so góða útbúgving sum yvirhøvur møguligt.

Uttan eitt vælvirkandi vinnulív verða heldur eingin vælferð fyri tað samfelagið og eitt av høvuðsmálunum hjá sambandsflokkinum er at gera góðar karmar fyri vinnuna fyri at kunna hava vælferðina fyri tað føroysa fólki í hásæti.

Sambandsflokkurin vil eisini virka fyri, at tað ikki eru bert tey fáu, sum kunnu virka og eiga vinnulívið, men at vit í framtíðini skulu fáa fleiri vinnulívsfólk, sum fáa loyvi at reka vinnuvirksemi, uttan tað almenna blandar seg.

Vel vælferð, vel tryggleika, vel sambandsflokkin.




**Ger teg og tíni út til veturin.**
Vind- og vatntøtt ketildrakt frá SCIERRA
Húgvur og stivlar frá EIGER

*Frá 18-24 desember verður latið 15% í avslátri av øllum vetrarklæðum, stivlum og fiskireiðskapi.*

***Rætta jólagávan fæst sjálvandi frá***

**NORÐOYA GASSØLU**
KLAKSVÍKSVEGUR 68
FO-700 KLAKSVÍK
TEL. 45 79 37


# Spennandi avbjóðingar fyri framman

**Dánial Petur Hansen**



Hóast tann stóri búskaparligi vøksturin, sum hevur verið í Føroyum tey seinastu árini, nú hevur lagt seg, og greið tekin eru um, at tey komandi árini koma at verða slakari búskaparliga sum heild, so veit Føroya fólk, at lítil nytta er í at seta seg niður og stúra fyri tíðini sum kemur. Umráðandi er við skynsemi og treystleika at taka ímóti teimum spennandi avbjóðingum, ið eru fyri framman.

### Sjálvstýri

Sjálvstýrisflokkurin var ein at teimum trimum heimastýrisflokkunum, sum 1. apríl í 1948 var við til at geva føroyingum Heimastýrislógina, og hevur síðani innan hesar karmar havt sum stevnu at virka fram ímóti einum sjálvbjargnum Føroyum. Sjálvstýrisflokkurin er ikki ein loysingarflokkur, har loysing í sær sjálvum er endamálið. Loysing í sær sjálvum er at meta sum eitt skralltómt hugtak - eitt fullveldishugtak uttan innihald.

Tað er fyrst og fremst mentunarliga Sjálvstýrisflokkurin hevur stríðst fyri Føroyum sum serstakari tjóð. Sjálvstýrisrørslan eigur soleiðis sín stóra leiklut í, at vit í dag tosa føroyskt í bæði skúla og kirkju, og at vit kunnu vinda Merkið á stong. Tað at skapa góðar karmar fyri einum fjølbroyttum og ríkum føroyskum mentunarlívi, tað verði seg andaliga sum tímiliga, innan bókmentir, list, tónleik, ítrótt, náttúru, samkomur, felagsskapir, v.m. hevur sjálvstýrisflokkurin altíð sæð sum ein av hornasteinunum, tá tað snýr seg um at menna føroyska fólkaræði.

### Menniskjalig vælferð er annað enn ein spurningur um búskap

Ásannandi at menniskjalig vælferð er annað enn ein spurningur um búskap, sær Sjálvstýrisflokkurin tað sum eina stóra avbjóðing, framhaldandi at betra og økja um vitanina og tilvitanina hjá okkum øllum. Hetta er ein av fyritreytunum fyri einum mennandi og uppbyggjandi samskifti og kjaki, ið eigur at eyðkenna eitt nútímans vælferðarsamfelag. Ein framhaldandi menning av okkara læru- og útbúgvingarskipanum er ein sjálvsagdur partur í hesum sambandi, eins og almennu loftmiðlar okkara, Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya, eiga at fáa ein nógv størri og virknari leiklut í hesi menningini.

Hóast ábreiðslurnar mangan hava verið harðar móti Sjálvstýrisflokkinum, tá hesin hevur hildið fast við tað hóvligu sjálvstýristilgongdina, vísa meiningakanningar, at flestu føroyingar meira ella minni taka undir við, at yvirtøkur bert eiga at verða framdar stig fyri stig so hvørt haldgott grundarlag er fyri hesum.

### Einskiljingar afturrinda okkara uttanlandsskuld

Heldur enn tey komandi árini at miða fram ímóti fleiri yvirtøkum, eigur at verða roynt at minka um uttanlandsskuld okkara, og harvið sleppa av við tær hundraðtalsmilliónir rentuútreiðslur á fíggjarlógini, sum árliga tyngja um okkara búskaparliga frælsi.

Ein av avleiðingunum av tí stóru búskaparkreppuni í nítiárunum varð, at tað almenna gjøgnum grunnar yvirtók stóran part av tí privata virkseminum, ið ikki megnaði at hóra undan. Nevnast kann Føroya Banki, Føroya Fiskavirking, Faroe Seafood og JFK-trol. Talan er her um fyritøkur, ið breið semja er um eiga at verða riknar av tí privata og stýrdar av teimum fríu marknaðarkreftunum og ikki tí almenna. Tað almenna, tað vil siga landið vegna okkum øll somul, átekur sær ein stóran váða og hevur stór kapitalvirði bundin í hesum fyritøkum. Einskiljing av hesum fyritøkum, saman við fyritøkum sum Føroya Tele, Atlantsflog, v.fl. vildi frígivið hesi kapitalvirði.

Kapitalurin sum fæst til vega frá einskiljingum eigur at vera nýttur til at niðurgjalda uttanlandsskuld okkara, og harvið minka munandi um rentuútreiðslur landskassans.

### Greiður skilnaður millum alment og privat

Rættast er at taka avgerð um hvar kapitalurin sum fæst til vega frá einskiljingum verður placeraður, áðrenn byrjað verður at einskilja, soleiðis at møguligar einskiljingar ikki økja rakstrarútreiðslurnar hjá tí almenna, ella á annan hátt órógva føroyska búskapin skeiva vegin.

Ein greiður skilnaður eigur at verða millum alment og privat, og nú tann føroyski Virðisbrævamarknaðurin er settur á stovn, eiga vit at byrja uppá at einskilja tær vinnuligu fyritøkurnar hjá landinum.

Neyðugt er at fara fram við skynsemi, og vil ein vælvirkandi føroyskur virðisbrævamarknaður verða við til at tryggja neyðuga gjøgnumskygnið, og at vit øll somul fáa nóg mikið fyri tær vinnuligu fyritøkurnar hjá landinum.

### Val í úrtíð

Tað, at útskriva val í úrtíð, verður vónandi ikki nakað, sum vit skulu til at venja okkum við. Hesaferð kom fráboðanin um nýval kortini ikki heilt óvæntað. Harmiligt er, at okkara kosnu menn og kvinnur fara so illa við hvørjum øðrum, at ongin annar útvegur er, enn at fáa eina nýggja byrjan.

At løgtingsval so brádliga varð útskrivað, nú jól er í hondum, eigur kortini ikki at órógva okkum um høgtíðina. Jólini er gleðishøgtíðin, ið savnar okkum øll somul, ætt vinir og kenningar, og vil eg enda við at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól.


# Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 211723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 341800


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 391,
Sp/f Demmus, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 11.12.2003.
**Nýtt Roknskaparár:** 01.01.-31.12.
**Umleggingarár:** 01.02.2003-31.12.2003.

*Skráseting Føroya tann 19. desember 2003*

*Kristin Balle*



## UTTAN ÚR HEIMI

# Stúra fyri yvirgangi um jólini



*Tom Ridge, amerikanskur ráðharri í innanlendis trygd: -Al Qaeda fyrireikar stórálop á amerikonsk mál á jólum og á nýggjárinum*

**Amerikonsku myndugleikarnir siga seg hava fingið tekin um, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda fyrireikar atsókn at amerikonskum málum um jólini.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Um vikuskiftið herdu amerikonsku myndugleikarnir tilbúgvingina, tí teir bera ótta fyri, at felagsskapurin hjá Osama bin Laden, al-Qaeda, fyrireikar seg til at søkja at einum ella fleiri amerikonksum málum.

Ráðharrin fyri innanlendis trygd, Tom Ridge, segði sunnudagin, at vandi er fyri atsóknum bæði á jólum og á nýggjárinum, og at talan kann verða um líka oyðandi atsóknir sum tann 11. september í 2001.

Á einum tíðindafundi segði ráðharrin, at amerikanska fregnartænastan hevur skrásett fleiri tekin í seinastuni. Hann segði, at víðgongdir felagsskapir sum al-Qaeda hava kanska ongantíð lagt seg so nógv eftir at raka amerikonsk mál sum júst nú.

Tað er serliga vandin fyri, at yvirgangsmenninir kunnu nýta flogfør í sínum atsóknum, sum ørkymlar amerikonsku stjórnina. Men vandi er eisini fyri lívfrøðiligum, evnafrøðiligum og geiðslavirknum álopum.

Seinast amerikonsku myndugleikarnir herdu yvirgangstilbúgvingina var í mai, tá sjálvmorðsbumbumenn sprongdu fleiri bumbur í Saudiarabia og í Marokko. Tær kravdu nógv mannalív.

# Lógirnar ímóti yvirgangi bróta mannarættindini

**Ein bretsk parlamentsnevnd sigur í einari niðurstøðu, at landsins tvey ára gamla yvirgangslóg brýtur mannarættindini í fleiri førum.**

MANNARÆTTINDI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bretska lógin ímóti yvirgangi er ov víðgongd og stríðir í fleiri førum ímóti altjóða reglunum um mannarættindi. Tað staðfestir ein nevnd hjá Parlamentinum, sum seinastu átta mánaðarnar hevur kannað lógina, sum stjórnin hjá Tony Blair, forsætisráðharra setti í gildi á heysti í 2001.

Lógin heimilar eitt nú myndugleikunum at halda aftur útlendingum í óásetta tíð, um illgruni er um, at teir hava samband við yvirgang. Løgregluni nýtist ikki at seta menninar fyri ein dómstól, og hesum finst parlamentsnevndin hvassliga at. Ístaðin fyri rættarfund skipar stjórnin fyri einari hoyring í hvørjum einstøkum føri, men hvørki tann tikni ella verji hansara sleppa at taka lut í hoyringini. Ein løgfrøðingur, sum stjórnin tilnevnir, umboðar tann tikna í hoyringini, og tað sigur parlamentsnevndin ikki vera nøktandi.

Nevndin vísir á, at síðani lógin kom í gildi, hava myndugleikarnir tikið 529 fólk, men enn eru bara 77 teirra skuldsettir, og bara sjey hava fingið dóm.

Erkabiskuppurin í anglikonsku kirkjuni, Rowan Williams, kom eisini við hvøssum atfinningum at bretsku yvirgangslógini sunnudagin. Við blaðið The Guardian segði hann, at lógin skaðar viðurskiftini millum kristin og muslimar.

– Lógin ger, at sjálvt heilt hóvligir muslimar kenna seg forfylgdar, segði erkabiskuppurin.

## Illveður

Tað var rættiligt illveður í norðara parti av Týsklandi og syðra parti av Svøríki sunnudagin.

Har suðuri í Svøríki legðist nógvur kavi. Harafturat var nógvur vindur, og fleiri bilar fóru út av vegunum, men mansskaði var eingin. Fleiri túsund hús mistu streymin, tí elleiðingar fóru í vindinum  Bæði tok- og flogferðslan  vórðu darvaðar av veðrinum. Eitt nú noyddist SAS at avlýsa fleiri ferðir.

Har norðuri í Týsklandi var so nógvur vindur, at fleiri bilar vórðu tiknir av vegunum, og fleiri elleiðingar fóru. Við Bad Kreuznach doyði eitt smábarn, og fýra onnur fólk fingu skaða í einari ferðsluvanlukku, sum stóðst av tí nógva vindinum. Løgreglan í Hamburg mátti 200 ferðir at hjálpa fólki, sum vóru komin illa fyri í illveðrinum, og fleiri ferjur avlýstu siglingina.

## 100 færri norsk farmaskip

Samstundis sum heimsins handilsflotar hava so nógv at gera sum sjáldan fyrr, vísir eitt yvirlit hjá norska farmaskipafelagnum, at seinastu tvey árini er talið á norskum farmaskipum minkað 16 prosent. Tað merkir, at skipini eru 101 færri í tali nú enn næstseinasta ársskiftið, skrivar Aftenposten.

Minkingin hevur eisini havt við sær, at munandi færri norðmenn sigla við farmaskipum nú enn fyrr. Teir eru ellivu prosent færri nú enn fyri tveimum árum síðani. Útlitini eru heldur ikki tey bestu, tí sambært yvirlitinum hjá reiðarafelagnum er talið á ungfólki við farmaskipunum minkað heili 21 prosent í hesum sama tíðarskeiðinum. Tað sæst eisini, at norsku reiðaríini byggja ikki nýggj farmaskip longur í sama mun sum fyrr. Síðani 1998 eru bíleggingarnar minkaðar heili 48 prosent.

Formaðurin í norska farmaskipafelagnum, Marianne Lie, sigur við Aftenposten, at politikararnir noyðast at fremja tiltøk, sum kunnu bøta um umstøðurnar at reka farmaskip í Noregi. Stjórnin hevur boðað frá lógarbroytingum í mars.

## Færri bankarán í Danmark

Seinastu árini er talið á bankaránum í Danmark vaksið nógv, men í ár hevur gongdin verið tann øvugta.

Undanfarin ár hava ránsmenn rænt millum 210 og 220 bankadeildir um árið í meðal, men higartil í ár er talið 175. Bankarnir hava fingið sær fleiri nýggjar trygdarskipanir, sum ivaleyst hava hjálpt, og løgreglan ivast ikki í, at tann nógva almenna umrøðan av nýggju trygdarskipanunum hevur fingið fleiri ránsmenn at setast aftur. Eitt nú veit almenningurin, at í summum bankadeildum eru eingir pengar uttan fyri avgreiðslutíðina. Samstundis hava fleiri bankar broytt nógvar deildir, soleiðis at tær nú bara ráðgeva viðskiftafólkinum. Skalt tú hava pengar, noyðist tú í sjálvtøkuna uttanfyri.

Men tað er dýrt at tryggja bankadeildir ímóti ránsmonnum. Í Nordea-bankanum verður sagt, at tað kostar umleið eina hálva millión krónur fyri hvørja deild. Í útlondum er vanligt at hava vápnaðar vaktarmenn í bankunum, men so langt vilja donsku bankarnir ikki fara.

## Boykotta val

Tann størsti frælslynti andstøðuflokkurin í Russlandi, Jabloko, kunngjørdi um vikuskiftið, at hann fer ikki at taka lut í forsetavalinum, sum verður tann 14. mars.

Formaðurin í flokkinum, Grigorij Javlinskij, segði, at soleiðis sum tann politiska støðan í Russlandi er háttað, ber tað ikki til at hava eitt demokratiskt val í landinum, og tí er tað ógjørligt at reka eitt valstríð fyri floksins forsetavalevni. Sostatt hevur Jabloko tikið somu støðu sum ein annar frælslyntur andstøðuflokkur, Høgrasamgongan, sum heldur ikki fer at taka lut í forsetavalinum.

Teir báðir flokkarnir siga í grundgevingunum, at teir almennu russisku fjølmiðlarnir geva Vladimir Putin, forseta so stóran stuðul, at tað ber ikki til hjá nøkrum øðrum valevni at reka valstríð. Teir almennu fjølmiðlarnir fingu somu ákoyuringina í sambandi við tjóðartingsvalið fyrr í hesum mánaðinum. Tá vann stuðulsflokkurin hjá Putin stórsigur.